| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**28. mars 2007** | Blað nr.: **6909** |
| | Formansins merki: |

# GERĐABÓK

**Dato:** **28. mars 2007**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:34/07-49/07**

**FUNDARLEIĐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

Bjarti Mohr

J. nr. 2004002360–7 SG

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**38/07** **2007-0170**

**Bjarti Mohr hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 28. mars 2007:**

**39/07** **2007-0171**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 28. mars 2007:**

**40/07** **2004-1271**

**Gamla tyrvingarplássið í Havnardali**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tyrvingarplássið í Havnardali varð brúkt til at tyrva burturkast, ið ikki kundi brennast, í tíðarskeiðnum uml. 1969-1987.

Økið, sum er partur av Flatnahaga, matr. 1160a (Tórshavnar kommuna er festari), er skógfriðað við friðingarbrævi frá 15. mars 1974.

Orku- og renovatiónsnevnd Tórshavnar býráðs samtykti 22. oktober 1987 at avrigga plássið og sendi hin 8. mars 1988 umvegis teknisku nevnd fíggjarnevndini kostnaðarmeting áljóðandi kr. 891.000,00 til at avrigga plássið.

Fíggjarnevndin samtykti 27. apríl 1988 at játta kr. 500.000,00 til niðurríving av bygningum og at hampa lendið, so langt peningur røkkur.

Í 1987 varð ein veit grivin í erva, at forða fyri at væta setur gjøgnum dungan, umframt at vegur niðan fyri dungan varð umlagdur og asfalteraður í 1987-88. Í tíðarskeiðnum 1998-2001 eru o.u. 20.000 m³ av mold tyrvdir omaná dungan.

Spurningurin um kanningar av plássinum hevur verið frammi í kommununi fleiri ferðir. Í skrivi frá býarverkfrøðinginum, dagfest 27. oktober 1980, til Flyvestation Thorshavn verður sagt, at kommunan í løtuni ikki kann taka ímóti 736 stk. Ni-Cd akkumulatorum vegna tess, at *”vit júst gera dálkikanningar av tí vatni, ið rennur frá ruskplássinum í Havnardali”*. Umsitingin hevur ikki funnið nøkur úrslit av hesum kanningum í skjalasavninum.

Uml. 1990-91 viðgjørdi Tórshavnar kommuna mál um kanning av tyrvingarplássinum í Havnardali (gl. j. nr. 17/4.1990). Niðanfyri er endurgivin úrskrift úr gerðabók fíggjarnevndarinnar:

***”Uppskot frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, dagfest 26. juli 1991 og 26. august 1991, til kanning av gamla tyrvingharplássinum í Havnardali.***

*Kanningin, ið upprunaliga er umbiðin av Tórshavnar kommunu, er um, hvønn mun tað gamla tyrvingarplássið ávirkar umhvørvið kemiskt og heilsuligt.*

*Kostnaðarmeting uppá kr. 86.000,00 er gjørd.*

***Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. november 1991:*** *Málið umrøtt og sent teknisku nevnd.*

***Tekniska nevnd 2. desember 1991:*** *Nevndin heldur, at nóg mikið er við nøkrum vatnroyndum í ánni.*

*Um neyvari kanningar skulu gerast, verður málið sent fíggjarnevndini við áheitan um at útvega neyðuga fígging.*

***Fíggjarnevndin 11. desember 1991:*** *Umsitingin ger uppskot til svarskriv.”*

Í svarskrivinum til Heilsufrøðiligu Starvsstovuni boðar kommunan frá, at ongin peningur er avsettur av teirri orsøk, at kommunan hevði ikki roknað við at skula gjalda kanningina, tí kommunan metti, at tað hevði almennan áhuga at starvsstovan hevði so stóra vitan sum gjørligt um tey árin, sum møguliga stóðust av einum tyrvingarplássi.

Hervið endar hetta málið um kanningina av plássinum.

Í februar 1996 ger Heilsufrøðiliga Starvsstovan kanning av Sandá, serliga við atliti at dálking frá kloakkum o.t. í samband við Sandágerð sum hvalvág. Kannað var ikki fyri evnum, sum kunnu stava frá tyrvingarplássinum í Havnardali.

Í desember 1996 ger ráðgevandi verkfrøðingafyritøkan sp/F Martin E. Leo eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu eina kanning og skráseting av dálking í og fram við Sandá. Viðvíkjandi tyrvingarplássinum verður skrivað soleiðis:

*"Gamla brennistøðin og tyrvingarplássið niðanfyri*:
*Tyrvingarplássið kundi verið betur frágingið. Ov lítið av mold er løgd omaná, serliga skráarnar. Rustvatn seyrar út undan plássinum."*

Í 1997 verður gjørd ein sýnistøka av vatni, sum seyrar frá tyrvingarplássinum. Viðmerkingin til hetta sýnið frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni var, at

*"Henda kanningin gevur nokk ikki tað rætta bílætið av, hvussu nógv seyrar frá sjálvur plássinum, við tað at nógv regn var blandað í vatnið. Best hevði verið, sum vit avtalaðu, at grivið eitt hol, har tað sæst at tað seyrar, og tikið nýggjan prøva, helst tá turkur er."*

Síðani er ikki meiri gjørt við málið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin ynskja, at nevndin tekur støðu til, um arbeiðið at kanna:

1. í hvønn mun tyrvingarplássið hevur kemisk/heilsulig árin á umhvørvið
2. hvørji tiltøk kunnu setast í verk til tess at minka um møgulig árin

skulu takast uppaftur.

Um avgerð verður tikin um at taka nevndu arbeiði uppaftur, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at fyrsta stigið verður at fáa ein serfrøðing á økinum frá útlendskari ráðgevarafyritøku at hyggja uppá plássið og umstøðurnar annars og tilevna eina virkisætlan, herundir kostnaðarmeting av møguligum kanningum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Nevndin samtykti at fáa ein serfrøðing á økinum at hyggja upp á plássið og umstøðurnar annars og tilevna eina virkisætlan, herundir kostnaðarmeting av møguligum kanningum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Serfrøðingur frá Rambøll hevur saman við ráðgevandi verkfrøðingunum sp/f Martin E. Leo skoðað umstøðurnar (notat, j.nr. 2004-1271-5). Niðurstøðan er greið; okkurt má gerast við at beina yvirflatuvatnið frá økinum fyri at minka um útvasking síðani at savna tað, sum seyrar frá í uppsavningarbrunn, gjøgnum drenrør og annars at hampa økið sum heild.

Fyribils kostnaðarmeting:

| | | |
|---|---|---|
| Starvsstovukanningar av tí sum seyrar frá og lendinum | kr. | 80.000,00 |
| Djúpari tvørrennur til omanávatn, omanfyri dungan | - | 500.000,00 |
| Dren og uppsavning til pergolat niðan fyri dungan | - | 400.000,00 |
| Áskot, mold og sáðing á skráar | - | 250.000,00 |
| Ábøtur á hegn, rørportur, skelting, og gróðurseting | - | 250.000,00 |

Í metingini er kostnaður fyri reinsiútbúnað til pekolat ikki tikin við. Her verður roknað við, at perkolatið kann reinsast við at veita tað gjøgnum eitt steindren (faskinu) niðan fyri dungan.

Metingin byggir á dagsprísir og er uttan MVG.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndu arbeiði verða sett í verk skjótast gjørligt, og at arbeiðini verða boðin út í byggistigum í nevndu raðfesting.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. juni 2004**: Nevndin samtykti at taka málið upp aftur í sambandi við komandi fíggjarætlanarviðgerð.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin vísir á tilmælið til fundin í heilsu- og umhvørvisnevndini 23. juni 2004 og at beina málið í fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging sambært mannagongd í sambandi við verkætlan, sum skal fíggjast av konto fyri íløgur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. apríl 2006:** Nevndin var á ástaðarfundi.

Nevndin samtykti, at umsitingin letur gera starvsstovukanningar av tí, sum seyrar frá lendinum at fíggja av rakstri konto 15 at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt, at umsitingin skipar fyri at rudda økið, og at hetta verður fíggjað av konto 12-5970 bráfeingis ruddingartiltøk.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt avtalu við ein entreprenør at rudda økið. Ruddingin byrjar í viku 23.

Martin E. Leo sp/f arbeiðir við at gera eina nýggja samlaða kostnaðarmeting av arbeiðinum, sum skal gerast.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. juni 2006:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Rambøll hevur gjørt eitt notat við kostnaðarmeting fyri feltarbeiði, sí j. nr. 2004-1271/11.

Eisini hevur Martin E. Leo sp/f gjørt eina samlaða kostnaðarmeting av arbeiðinum, sum skal gerast í Havnardali, sí j. nr. 2004-1271/12.

Tikið er av tilboðnum hjá Rambøll, og sambært tíðarætlanini byrjar arbeiðið í viku 39.

Kunnað verður um málið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at settar verða kr. 2.986.000,00 av til íløgur at fíggja arbeiðið av kloakkum/umhvørvi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 14. september 2006:** Nevndin samtykti at heita á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 1.986.000,00 av íløgum fyri kloakkir/umhvørvi.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Útsett til nærri kanningar.

**Ískoyti:**
Kanningarúrslit frá Rambøll fyriliggja, sí j.nr. 2004-1271/16.

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin koma við tilmæli til fundin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. desember 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin útvegar tilboð upp á arbeiðið at gera djúpari tvørrennur til omanávatn, oman fyri dungan, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Ætlanin er at hava ein tíðindafund, møguliga í januar 2007, har kanningarúrslit frá Rambøll verða løgd fram og kunnað verður um arbeiðið, sum verður gjørt í Havnardali.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. januar 2007:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilboð uppá arbeiðið at gera djúpari tvørrennur fyriliggja, sí j.nr. 2004-1271/20.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin koma við tilmæli til fundin.

**Ískoyti**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 265.470.- (uttan MVG).

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og fíggja av konto 90.

**Ískoyti:**
Arbeiðið bleiv boðið út sum undirhondsboð, og teir bjóðandi vóru:

| | |
|---|---|
| Andrias Berg upphædd: | kr. 265.470,00 u/mvg |
| Maskingrevstur v/ Frank Hellisdal upphædd: | kr. 327.900,00 u/mvg |

**Býráðið 28. mars 2007:**

**41/07** **<u>2005-0511</u>**

**<u>Nýtt røktarheim yviri við Strond.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Við støði í skrásetingunum hjá Heimarøktini av røktartørvinum hjá tí einstaka brúkar-anum gjørdi Almanna- og heilsumálastýrið í 2005 eina kanning av tørvinum á ellis- og røktarheimsplássum.

Kanningin vísti, at tá Heimið við Vallalíð og nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn vóru tikin í nýtslu, vildi tørvurin í Suðurstreymi vera:

16 røktarheimspláss
29 ellisheimspláss
4 pláss til minnisveik
3 sambýlispláss

Tilsamans er sostatt tørvur á 52 plássum

Eftir tilmæli frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum samtykti sosiala nevnd tann 7. juni 2005, at farið varð undir fyrireikingar at byggja nýtt ellis- og røktarheim at nøkta tørvin á eldrabústøðum, og at játtaðar vóru kr. 100.000,00 av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiskrá.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Stovnsleiðararnir á verandi eldrabústovnum í kommununi hava latið gjørt eina nýggja kanning av tørvinum.

Sambært hesi kanning er tørvurin, eftir at nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn er tikið í nýtslu:

21 røktarheimspláss
38 ellisheims- og ella sambýlispláss
26 pláss til minnisveik
9 pláss til brúkarar við serligum tørvi (psykiatriskt røktarheim)

Samlaði tørvurin er sostatt 94 pláss.

Hóast nakrir av hesum brúkarum ikki beinleiðis hava ein bráfeingis tørv, so er eingin ivi um, at tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum í kommununi framvegis er stórur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin mælir til, at nevnd verður sett at fyrireika arbeiðið at byggja nýtt ellis- og røktarheim á trøðni, sum kommunan ognaði sær Yviri við Strond, og at 500.000 kr. verða játtaðar av íløgunum á eldraøkinum til endamálið.

**Sosiala nevndin 11. apríl 1006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 500.000,00 av íløgum á eldraøkinum til gerð av byggiskrá til ellis- og røktarheim Yviri við Strond og at seta bygginevnd.

Nevndin samtykti eisini at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at broyta byggisamtyktina fyri økið, so tað kann brúkast til omanfyri nevnda endamál.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Ískoyti:**
Økið, ið talan er um, liggur sum A1 øki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økið er eisini umfata av serstøku byggisamtykt nr. 7. Her liggur tað sum A2-øki

Sambært Gr. 2 í serstøku byggisamtykt nr. 7, skulu eindirnar A1 og A2, ikki verða nýttar til annað enn sethús. Á hvørjari ogn mugu einans verða bygd eini stakhús, við í mesta lagi tveimum ibúðum.

Sosiala nevnd heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um, at ásetingarnar fyri hetta øki verða broyttar til E (øki til alment endamál) í serstøku byggisamtyktini.

Aðrir almennir stovnar liggja innanfyri serstøku byggisamtykt nr. 7. T.d. liggja Lágargarður og Tjarnagarður í E-økinum, Adventistaskúlin liggur í C3-øki og Eysturskúlin í C2-øki.

29. november 2004 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin at endurskoða ella avtakað serstøku byggisamtykt nr. 7. (mál nr. 2004-2762)

**2004-2762**

**Endurskoðan av byggisamtykt nr. 7**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2004:** Vísandi til at tað hevur verið trupult at umsita serstøku byggisamtyktina nr. 7, samtykti nevndin, at umsitingin kannar eftir, um samtyktin kann broytast ella avtakast, soleiðis at ásetingarnar fyri økið verða greiðari.

Vegna ov lítla arbeiðsorku ella vegna raðfestingar, er hetta arbeiði enn ikki gjørt.

Serstaka byggisamtykt nr. 7 fevnir um eitt sera stórt øki og er nógv meira nágreinilig enn almenna byggisamtyktin. Tí krevur tað eina stóra arbeiðsorku at avtaka ella endurskoða hana.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at broyta ásetingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri matr.nr. 1308 frá at vera A2 øki til stakhús, til at verða øki E til alment endamál. Víst verður til, at kommunan hevur ognað sær økið til alment endamál, og til at økið við hesum ikki hækkar í søluvirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006:** Nevndin samtykti at broyta ásetingarnar fyri matr.nr. 1308 til øki E, alment endamál.

**Býráðið 29. juni 2006:** Atkvøtt var um tilmælið hjá byggi- og býarskipanarnevndini, sum var samtykt við 12 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Jan Christiansen greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
Býráðið valdi 27. apríl 2006 Katrin Dahl Jakobsen og Beate L. Samuelsen sum limir í bygginevndini.

18. apríl 2006 varð umsókn send Almanna- og heilsumálaráðnum um stuðulslán. Í umsóknini varð víst á, at kommunan í fyrsta umfari ætlaði at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimsplássum, men at møguliga kundi verið bygt í stigum, soleiðis at byrja varð við 24 røktarheimsplássum.

Á fundi við umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið varð av kommununi ført fram, at kommunan hevði sett sær fyri at fáa nýhugsan innan eldrarøktina og hevði tí ætlanir um at fara undir eina kombineraða verkætlan á økinum yviri við Strond. Ætlanin umfataði ein røktarheimspart, eitt ávíst tal av vardum eldraíbúðum og eitt dagsentur. Samanborið við siðbundnu loysnirnar í dag, fer tað eftir hesum leisti at bera betri til at veita okkara gomlu eitt heildartilboð, har rúm verður fyri liðiligheit millum eindirnar.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivið dagfest 24. mai 2006 givið kommununi tilsøgn um studningslán á í mesta lagi 12. mió. kr. til røktarheimspartin av verkætlanini, sum fevnir um 24 røktarheimspláss. Tann endaliga játtanin av studningsláninum er tó treytað av, at nakrar treytir verða uppfyltar m.a., at raksturin av røktarheimspartinum í verkætlanini á ongan hátt verður tvinnaður saman við rakstrinum av vardu íbúðunum.

Á fundi í bygginevndini hevur umboðið fyri teknisku fyrisitingina gjørt vart við, at fyri at bygginevndin skal kunna koma víðari við sínum arbeiði, verður neyðugt at leggja málið fyri politiska myndugleikan at taka støðu til, hvat byggiskráin skal innihalda.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at arbeiðssetningurin sambært § 4 í fundarskipan fyri bygginevndir verður at gera byggiskrá umfatandi røktarheimspartin á 24 pláss, sum skal innganga sum partur av eini heildarætlan fyri økið, har eisini hædd verður tikin fyri dagsentri og einum ávísum tali av vardum eldraíbúðum.

**Sosiala nevndin 31. oktober 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

Bygginevndin hevur latið gjørt byggiskrá umfatandi 24 røktarheimspláss við tilhoyrandi ergo- og fysioterapideild. Í byggiskránni er hædd tikin fyri, at røktarheimið skal vera partur av eini heildarætlan, har eisini eitt dagsentur og 24 vardar eldraíbúðir innganga.

**Sosiala nevndin 6. februar 2007:** Byggiskráin varð gjøgnumgingin. Málið verður viðgjørd aftur á komandi fundi.

**Ískoyti til byggiskránna.** Sambært løgtingslóg nr. 166 frá 22. desember 2005 um studningslán til ellis.- og røktarheim og eldrassambýli verður í viðmerkingunum sagt, at *sum ellis-og røktarheim verður roknað eldrabústovnur, við plássi fyri í minsta lagi 20 búfólkum. Støddin á bygninginum skal í minsta lagi vera 75m² (brutto) fyri hvørt búfólk. Støddin á búrúminum hjá íbúgvunum skal í minsta lagi vera 22m² (brutto) við tilhoyrandi bað/WC, á í minsta lagi 4,5m² (brutto). Harumframt skulu ellis- og røktarheim hava køk við nøktandi stødd (ídnaðarkøk) og hava innrættað nøktandi høli til fysioterapi og ergoterapi.*

Til 24 búfólk skal bygningurin sostatt verða í minsta lagi 1.800m².

Í byggiskránni verður mælt til eina samlaða stødd uppá 2.219m². Herav eru 278m² til fysio- og ergoterapi og 235m² til køk og kafeteria.

Til 24 búfólk er ikki neyðugt við so nógvum fermetrum til fysio- og ergoterapideild og til køk v.m. Um verkætlanin bert umfataði 24 røktarheimspláss metir bygginevndin, at samlaða fermetratalið kann haldast á leið 1.800. Men av tí at arbeiðssetningurin hjá bygginevndini eisini umfatar, at røktarheimið skal vera partur av eini heildarætlan fyri økið, har eisini hædd verður tikin fyri dagsentri og einum ávísum tali av vardum eldraíbúðum, metir bygginevndin, at støddin á ergo- og fysioterapideildini og á køkinum eigur at vera gjørd sambært byggiskránni, so hesar funktiónir vera nøktandi, tá økið vantandi er fult útbygt.

**Kostnaður:**
Við einum kostnaði á kr. 20.000 pr. m² verður samlaði kostnaðurin fyri 1. byggistig mettur til kr. 44.380.000. Almanna- og heilsumálaráðið hevur játtað kr. 12.000.000. Kommununar partur verður sostatt kr. 32.380.000.

Bygginevndin er samd um at mæla til, at dispositiónsuppskot verður gjørt fyri samlaðu verkætlanina, og at skitsuprojekt verður gjørt fyri 1. byggistig, sum umfatar 24 røktarheimspláss við stórkøki og fysio- og ergoterapideild.

Bygginevndin mælir til at bjóða arbeiðið at projektera 1. byggistig út millum ráðgevaravirkir at gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri verkætlanina. Skitsuuppskotini skulu grundast á byggiskránna. Mælt verður til at játta kr. 500.000,- til hetta arbeiði, og at bygginevndin metir um innkomnu uppskotini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevnd 6. mars 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum, og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 28. mars 2007:**

42/07 <u>2004-0214</u>

**<u>Nýggjur fólkaskúli við Løgmannabreyt</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum. Frítíðarskúlin skal hýsa 1. og 2. flokki.

Í heildarætlanini skal pláss leggjast av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni.

Eftir starvsskipanini hjá kommununi í byggimálum fær mentamáladeildin eina byggiskrá til vega. Henda byggiskrá verður síðani grundarlag undir útinning av verkætlanini, sum byggideildin hevur ábyrgdina av.

Endamálið við byggiskránni er:

<u>at</u> orða og samskipa tørv, ynski og krøv arbeiðsánarans
<u>at</u> útgreina, í hvønn mun tað ber til at ganga hesum tørvi, ynskjum og krøvum á møti
<u>at</u> vísa á prinsipployśnir á hesum grundarlagi

Við tí í huga at støðug menning og broyting er innan skúlaøkið, og at roknast kann við umskipaðum virksemi, tá nýggir karmar loyva hesum, er lítið sannlíkt, at tað ber til at gera eina neyva meting nú av, hvussu virksemið verður, tá ætlaða byggingin verður tikin í nýtslu. Tí er dentur lagdur á at skapa so víðar og broytiligar umstøður sum gjørligt til skúlan.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur staðið fyri byggiskránni, hevur viðgjørt stakspurningar saman við fólki við serligum innliti, tá tað hevur verið mett neyðugt.

Byggiskráin er býtt upp í 4 partar:

1. Almennur partur
2. Námsfrøðiligur partur
3. Hølisskrá
4. Byggitøkni

**Grundøki**
Kommunan hevur lagt av eitt øki við Løgmannabreyt til skúlan. Víddin er sambært korti 17.600 m². Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Støddin tykist hóskandi, tá hugsað verður um tørvin á byggilendi (nakað minni enn 5.000 m², tí bygt verður væntandi í meira enn einari hædd), fríøki (minst eini 10 m² fyri hvønn næming) og ferðslu (vegir, gøtur, bilpláss). Tá farið verður undir at gera byggiuppskot, má kortini metast um støddina við atliti til byggihátt, landslag og ferðslu.

**Kostnaður**
Bygningsstøddin er ásett av Tórshavnar kommunu. Støddin er grundað á eina brutto gólvvídd uppá 11 m² fyri hvønn næmingin. Afturat hesum kemur pláss til frítíðarskúla í 1. og 2. flokki, og pláss til skúlabarna-tannlækna.

Samlaða næmingatalið, tá skúlin er fult útbygdur, kann setast til eini 450. Tá er roknað við 18 flokkum við 25 næmingum.

Út frá hesum kann væntast, at samlaða gólvvíddin verður umleið 5.400 m².

**Kostnaðarkarmur**
Sum grundarlag undir framhaldandi ráðleggingini ber helst til at siga, at samlaða íløgan uttan meirvirðisgjald verður:

5.400 m² av gólvvídd fyri 5.400 m² x kr. 18.000 = 97,2 mill. kr.

Hetta má kortini metast sum ein vegleiðandi karmur, til støða er tikin til, hvussu byggiætlanin skal fremjast.

**Tíðarætlan**
Skotið verður upp, at skúlin skal byggjast í einum, men byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla skjótast gjørligt, og hinir so hvørt byggingin verður liðug.

Eftir tíðarætlanini verður allur skúlin liðugur á sumri 2006.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna fyriliggjandi byggiprogramm, at projektering verður sett í verk beinanvegin, og at peningur verður játtaður til hetta av íløguætlanini 2003 og 2004.

**Mentamálanevndin 16. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamáladeildarleiðaranum og leggja málið fyri býráðið.

Eisini samtykt at heita á plandeildina um at skipa soleiðis fyri, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla í august 2005, og hinir flokkarnir so hvørt byggingin verður liðug.

**Býráðið 25. september 2003:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá dispositión og projektuppskot eru liðug.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

1) at verkætlanin verður gjørd í ”partnering”.

2) at projektuppskot verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar saman við kostnaðarmeting og cachflow.

3) at arbeiðið verður boðið út, tá projektuppskotið er gjørt, og at teir bjóðandi verða 3 entreprenørar, sum hava royndir innan partnering.

4) at ein treyt í útbjóðingartilfarinum verður, at teir bjóðandi í største mun skulu nýta føroyskar undirarbeiðstakarar.

5) at tilboðini, sum koma inn, verða løgd fyri nevndina aftur til støðutakan við tilmæli frá stýrisbólkinum.

6) at stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis:
   Eitt umboð fyri arbeiðsánaran,
   Eitt umboð fyri arkitektin,
   Eitt umboð fyri verkfr. (møguligt)
   Eitt umboð fyri entreprenørin

7) at arkitektaráðgevi verður settur beinanvegin, og verkfrøðingaráðgevar tá tørvur er á tí.

8) at kommunan setur ein samskipara/skrivara í starv á planleggingardeildini í fulla tíð til burturav at taka sær av verkætlanini, og at hetta starv verður lýst leyst. Starvið skal verða tíðaravmarkað frá febr./mars 2004, til byggingin er liðug og avhendað.

9) at projektleiðari verður valdur av stýrisbólkinum, tá hesin, eftir útbjóðing hevur sett organisatiónina saman.

Umframt omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at mentamálanevndin tekur støðu til:

10) um ítróttarhøll ella fimleikahallirnar skulu gerast.

11) um graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennufjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, men spurningurin um útbjóðingarhátt verður viðgjørdur á einum seinni fundi.

Eisini samtykt at taka undir við, at ein dupult fimleikahøll verður gjørd og at taka undir við at graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennifjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 3. desember 2003:** Samtykt at fara undir projekteringsarbeiðið beinanvegin og gera uppskot til arbeiðs- og tíðarætlan at leggja fyri nevndina á fyrsta fundi 2004.

Málið verður sent til byggideildina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til hvønn av omanfyri nevndu møguleikum skal arbeiðast eftir.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við uppskoti 2 at leggja fyri nevndina skjótast gjørligt og beina málið í byggideildina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sambr. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til ger av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

**Ískoyti:**
Árni Winther, ark., hevur gjørt dispositiónsuppskot.

**1. Inngangur**
Tórshavnar kommuna hevur latið gera eina byggiskrá, sum lýsir ætlanina at byggja ein nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Byggiskráin er í fýra pørtum og dagfest juni 2003. Byggiætlanin er síðani viðgjørd politiskt og námsfrøðiliga. Eftir ársskiftið varð arbeiðið at fáa til vega eitt skipanaruppskot sett í verk.

Stórur tørvur er á nýggjum skúla í økinum. Kortini hevur kommunan mett, at ein so stór verkætlan skal umhugsast gjølla, áðrenn farið verður undir byggingina. Tí verður arbeitt

við at fáa skúlastovur tøkar við verandi Hoyvíkar skúla frá skúlaárinum 2005/2006 til yngstu flokkarnar. Hesir flyta so í nýggja skúla, tá hann er klárur at taka í nýtslu.

Ætlanin er at byggja nýggja skúlan so skjótt, hetta verkliga letur seg gera, og fíggjarorkan hjá Tórshavnar kommunu loyvir.

**2. Grundøki**

Í heildarætlanini fyri Hoyvíkshagan hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt økið av til nýggjan fólkaskúla. Økið er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð. Eystast er hagalendi við jøvnum halli suðureftir, í miðjuni eitt gil við einum hamarskapilsi upp frá eystureftir, og eystasti parturin er ein slætti við jøvnum halli suðureftir. Ein lítil graslíkisvøllur er inn frá Løgmannabreyt.

Á grannaøkinum eystanfyri er partur av ætlaðu miðstaðarbyggingini, sum gongur oman og niðan frá Vegnum Langa.

Samlaða støddin á økinum, sum er sett av til skúlan, er umleið 17.600 m².

**3. Innrættingin námsfrøðiliga**

Hølisskipanin byggir á tann partin av byggiskránni, ið lýsir námsfrøðiligu hugtøkini, sum skúlin skal virka eftir. Arbeiðsbólkurin, ið tilevnaði byggiskránna, hevur havt høvi at gera viðmerkingar, meðan arbeitt hevur verið við skipanaruppskotinum.

Grundhugsjónin er: “ at byggiháttur og innrætting skúlans er fyriskipað soleiðis, at tað ber til at hava eina fjølbroytta undirvísing, ið verður lagað eftir tørvi og fortreytum næminganna.”

Hølini eru av hesi orsøk ymisk í skapi, støðd, hædd, tilfari, litum og ljósi.

Flokkarnir hoyra til “ heimsrustir”, sumumfata:

- 1.-3. flokk við frítíðarskúla
- 4.-5. flokk
- 6.-7. flokk
- 8.-9. flokk

Serhøli er í fakdeplum, sum hava hvør sínar bygningskarmar, svarandi til ymiska tørvin.

**4. Lendisskipan**

Tilkoyring er skipað í samstarvi við vegaumsitingina soleiðis, at børn trygt kunnu verða sett av í lumma framvið Løgmannabreyt, og bilarnir fáa vent í komandi rundkoyring beint omanfyri.

Bilar, ið skulu steðga, koyra eysturum við tilkoyring frá nýggja miðstaðarøkinum har. Pláss er fyri umleið 60 parkeringsplássum. Økið eystanfyri er harumframt lagt av til ítróttarendamál.

Vestanfyri er góður sólargangur og møguleiki at skapa lívd, so her eru spælipláss og fríøki til næmingarnar. Sunnanfyri er útiøki uppat matarhøll, og skermað útiøki til yngstu næmingarnar í skúla og frítíðarskúla.

Í byggiskránni var kravt, at øki skal ávísast til eina nýggja svimjihøll. Mælt verður til, at henda verður partur av miðstaðarøkinum, sum liggur høgliga fyri hjá skúlanum og almenninginum, og kann brúka somu parkeringspláss, tá skúlin ikki er í nýtslu

**4. Umfatan**

Í byggiskránni grein 5.1 vóru nakrar metingar gjørdar um samlaðu gólvvíddina, grundaðar á ein karm uppá 11 m² fyri hvønn næming, ið Tórshavnar kommuna hevur víst á. Samlaða støddin var út frá hesum sett til 5.400 m², har umleið 450 m² vóru til heilsurøkt og frítíðarskúla.

Eisini var í hesi grein í byggiskránni sagt: *“So hvørt byggiætlanin gerst meira ítøkilig, verður mett um, hvussu støddarkarmurin hóskar.”*

Í skipanaruppskotinum eru ynski og krøv til innrætting samanfatað í eini ítøkiligari byggiætlan, har hvør einstøk funktión er vigað eftir námsfrøði, bygging og stødd/kostnaði.

Fyri at halda støddarkarmin, eru nakrar raðfestingar gjørdar í byggiskránni.

Mett verður, at heimaøkini ikki kunnu gerast munandi minni um námsfrøðiliga grundhugsanin ikki skal fara fyri skeyti. Somuleiðis er støddin á flestu fakhølum á markinum til tað sum krevst.

Hinvegin er økið til ítrótt minkað samanborið við ásetingarnar í byggiskránni, har ynski varð tvær hallir nakað størri enn vanligar himleikahallir, umframt pláss til amboð, neyðug skiftirúm o.a.

Orsøkin til hesa minking er partvís, at ítróttarøki er sera plásskrevjandi fyri hvønn næming, og partvís tí, at á donsku skúlunum, ið bygdir eru sambært somu fortreytunum, er eitt ikki so stórt multirúm til ítrótt, ístaðin fyri eina ella fleiri fimleikahallir/ítróttarhallir.

Hølisyvirlit:

| | |
|---|---|
| Heimrustir | 2.141 m² |
| av hesum frítíðarskúli | 237 m² |
| Felagsøki og fyrisiting | 1.608 m² |
| Ítróttur | 685 m² |
| Fakdeplar | 890 m² |
| Heilsurøkt | 126 m² |

Bruttostødd tilsamans 5.450 m²

**4. Byggitøkni**

Sum grundarlag undir byggiháttinum eru hesar fortreytir valdar:

- Tað er av stórum týdningi, at tilfar og konstruktiónir tola ætlaðu nýtsluna. Hetta hevur týdning bæði fyri at skúlin ikki alt fyri eitt sær slitin út, so næmingarnir ikki virða bygningskarmarnar, og fyri at viðlíkahaldið ikki skal gerast ov stórt.
- Fyri at avmarka íløguna mest møguligt, verða einfaldar loysnir valdar, allastaðni har tað ber til.

Vit ímynda okkum léttar konstruktiónir, helst úr stáli og timbri, við neyðugum stoyptum konstruktiónum. Bygningsskapið ger, at tryggar loysnir kunnu veljast til at fáa tett móti avfalli og vindi.

Støða er ikki tikin til uttandura klæðing av veggjum og tekju. Tilfarið skal tola veðurlag og slit av nýtsluni, og avmarka viðlíkahaldið. Skilaveggir úr plátum við neyðugari styrki og ljóððdoyving. Loftini eru kløddd við ljóððdoyvandi gipsplátum. Gólv løgd við t.d. linoleum, í duri flísar. Innhurðar við massivum hurðabløðum.

Roknað er við, at heimrustir, heilsurøkt og verkstaðsbygningur verða sjálvstøðugar brunaeindir í eini hædd við rýmingarleiðum beinleiðis út í lendið. Hetta er mest einfalda loysnin. Brunatrygd í felagsøkjum skal tryggjast eftir samráðing við myndugleikarnar við atliti til nýtslumøguleikar og kostnað.

Hóast ongi lógarfest krøv eru, verður mælt til, at rørslutarnað fáa brúkt skúlan. Hetta er gjørligt við vístu skráunum og lyftu.

Krøvini til inniklima eru lógarfest. Sambært reglunum skal mekaniskt luftskifti verða í nýggjum skúlum. Tó ber til at víkja frá hesum, um tað er sannlíkt, at inniluftin verður nóg góð við øðrum tiltøkum. Við okkara royndum á økinum mæla vit til, at loftshæddin verður stór og teldustýrt natúrligt luftskifti tryggjað. Fortreytin fyri, at hetta riggar er, at sólskermingin er munagóð.

Roknað er við fjarhita. Mælt verður til at kanna, um tað loysir seg at brúka tekjuna til orkuískoyti við sólorku.

Bygningurin skal fyrireikast til tráðleysa samskiftisútgerð.

**5. Tíðarætlan**

Verkætlanin verður útint við støði í tíðarætlan, *Fylgiskjal 2*, til byggiskránna. Staðfestast kann, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi uppskotsstiginum ikki varð klárt at byrja sum ætlað, og at tað hevur tikið drúgvari tíð enn mett. Kortini forðar hetta ikki fyri, at komandi arbeiði verður gjørt innanfyri tey ætlaðu tíðarskeiðini frá nú at rokna.

Tá støða er tikin til, hvussu skúlin verður tikin í nýtslu, og tá greitt er, hvussu íløgukarmurin fyri hesa bygging sær út í mun til heildarkarmin hjá kommununi, verður tíðarætlanin endurskoðað.

**6. Kostnaður**
Verður metingin í byggiskránni (grein 5.2.) endurskoðað við somu fortreytum (m.a. príslegu várið 2003), við støði í støddini sambært *4. Umfatan* verður úrslitið:

**5.450 m² av gólvvídd fyri kr. 18.000 = 98,1 mill kr.**

Ein meira nágreinilig meting, sum byggir á veruligar nøgdir sambært hesi verkætlan, skal gerast í næsta arbeiðsstiginum, tá yvirskipað støða er tikin til bygningskonstruktiónir og –innleggingar.

**Víddin økjast**
Skal samtyktin í mentamálanevndini uppfyllast um, at skúlin skal innihalda eina dupulta fimleikahøll, má víddin økjast við 175 fermetrum.

Meirkostnaðurin fyri hesar fermetrarnar er 3,2 milliónir krónur, roknað út frá somu fortreytum sum samlaða kostnaðarmetingin.

Heildarætlanin verður ikki ávirka annars av hesi øking.

Árni Winther, arkitektur, kemur at greiða frá uppskotinum.

Mentamálanevndin 30. juni 2004: Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna skipanaruppskotið frá mai 2004, tó við tí broyting at ein dupult fimleikahøll verður gjørd, sum krevur umleið 175 m² afturat, og at høli til tannlækna og heilsukanningar verður víðkað við umleið 50 m².

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum um at byggja nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum tó við teirri broyting, at ásetingin, um at skúlin bert skal fevna um 1. til 9. flokk, verður tikin burtur. Í staðin fyri verður mælt til at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð og støðutakan til, um ikki skúli eigur at vera fyri næmingum í 1. til 10. flokki í Hoyvíkshaganum.

Atkvøtt var um kravið frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í mentamálanevndina, sum var samtykt við 6-2 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Jákup S. Joensen. Ìmóti atkvøddu Leivur Hansen og Elin Lindenskov.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 25. september 2003 at taka undir við mentamálanevndini, at kommunan fór at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum.

Grundarlagið undir samtyktini var, at mentamálanevndin á fundi 25. september 2002 samtykti, at skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk, og at núverandi Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk.

Somuleiðis varð samtykt, at 10. flokkarnir fara oman í Eysturskúlan. Eisini fara næmingarnir í Kollafirði í 8. og 9. fl. at vera í skúlanum í Kollafirði.

Í sambandi við avgerðina um at hava framhaldsdeild í Hoyvík og Kollafirði verða skúlastovur tøkar á Eysturskúlanum, sum gevur møguleikar at víðka og menna samstarvið í 10. flokkunum. Næmingarnir úr Hoyvík, Kaldbak og Kollafirði fara at ganga í 10. flokki á Eysturskúlanum, men talan kann eisini verða um at víðka samstarvið at fevna um aðrar skúlar.

Í skrivi, dagfest 6. apríl 2004, frá Mentamálaráðnum til Tórshavnar kommunu um 10. flokk sigur Mentamálaráðið m.a.

” Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, ið skrivaði Álit um nýggja fólkaskúlalóg í 1997, sum er grundarlagið undir verandi fólkaskúlalóg, hevur m.a. víst á, at tað hevði helst verið best, um teir uml. 600 næmingarnir í 10. flokkunum í Føroyum høvdu verið savnaði í ein ella tveir fólkaskúlar, tí bert á tann hátt hevði tann einstaki næmingurin í størst møguligan mun fingið síni lærugreinaynski uppfylt. Ætlanin við at 10. flokkur skuldi verða heilt valfríur, var júst tann, at tann einstaki næmingurin skuldi í nógv størri mun enn áður kunna seta sína egnu útbúgving saman. Skal hetta eydnast er neyðugt við stórum skúlaeindum, antin sum skúlasamstarv ella við at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í einum stórum skúla.”

Byggideildin hevur kannað, hvat meirkostnaðurin verður, um ynski er at taka tríggjar 10. flokkar við í verkætlanina.

Sambært teimum fortreytum, sum higartil eru nýttar at meta um kostnaðar-karmin, sær ein øking soleiðis út sambært arkitektavirkinum Árni Winther:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Øking av víddini: | 75 næm. * 11 m² pr. næm. | = | 825 m² |
| Meirkostnaður: | 825 m² * 18.000 pr. m² | = | 14.85 mill. kr. |

Vit gera vart við, at hesin kostnaður má metast sum ein grundíløga til at hýsa 75 næmingum afturat. Vit hava ikki kannað serstøk krøv til 10. flokkar, heldur ikki hava vit verið í samband við arbeiðsbólkin hjá byggiharranum hesum viðvíkjandi.

Um ein so stór øking/broyting í verkætlanini skal gjøgnumførast, er sjálvsagt, at vit eiga at endurskoða skipanaruppskotið frá mai 2004.

Í skúlaárinum 2004/2005 eru 186 næmingar í 10. fl. Tað eru 26 næmingar (ein fl.) færri enn síðsta skúlaár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda fram við upprunaligu ætlanunum at byggja nýggjan 2-sporaðan skúla við Løgmannabreyt til 1.–9. flokk og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk vísandi til:

at fólkaskúlalógin frá 1997 mælir til størri skúlaeindir í 10. flokkunum, sum mentamálaráðið eisini mælir til.
at skúlastovur verða tøkar í Eysturskúlanum, tá ið næmingarnir í 8. og 9. flokki í Hoyvík og í Kollafirði í framtíðini ikki koma at ganga har.
at meirkostnaðurin verður umleið 15 mill. kr. um 10. flokkur verður við verkætlanini.
at neyðugt verður at endurskoða alt skúlaprojektið, sum aftur fer at hava við sær, at verkætlanin dregur út.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur undir við byggiætlanini, men mælir til, at pláss eisini verður fyri 10. flokki.

Fyrst var atkvøtt um minnilutatilmæli hjá Høgna Mikkelsen sum fall við 1 atkvøðum fyri og 10 atkvøðum ímóti. Fyri atkvøddi Høgni Mikkelsen. Ímóti atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup S. Joensen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen. Bjarti Mohr greiddi ikki atkvøðu.

Síðani var atkvøtt um tilmæli hjá Mentamálanevndini tann 30. juni 2004 sum var einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Árni Winther, arkitektur og Palli Henriksen, samskipari, kunnaðu um málið.

**Ískoyti:**

Kunnað verður um kostnaðin av skúlanum

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Bygginevndin kunnaði um kostnaðarmetingina, og hvussu langt arbeiðið er komið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggibúna økið var boðið út í innbodnari lisitatión millum 5 fyritøkur. 4 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Tilboðini eru (uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 8.656.258,00 |
| H.V. Lútzen P/F | kr. 8.710.130,00 |
| P/F J. & K. Petersen | kr. 7.862.666,35 |
| Samtakið TH & ZRJ | kr. 7.067.578,00 |

Árni Winther, arkitektar, hava saman við Landsbyggifelagnum og Sofus M. Jacobsen kannað og eftirroknað tilboðini. Hesir meta samlaðu tilboðshæddina sum lága, men forsvarliga. Kostnaðarmetingin segði kr. 7.885.160,00.

Til kunningar verður sagt frá, at bygginevndin hevur samtykt at bjóða arbeiðið við skúlan út í tveimum umførum afturat: Rábygningur fyri seg og liðugtgeran fyri seg. Hetta verður gjørt fyri at fáa skúlan lidnan til tíðina, t.v.s., at projekteringin kann halda fram, sjálvt um spakin er settur í.

**Tilmæli**
Bygginevndin mælir til at taka av lægsta tilboði áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játtað kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25%.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Miðfyrisitingarstjórin var á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir til tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játta kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25% og beina málið í býráðið.

Nevndin harmast um at røtt mannagongd ikki er brúkt.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti**
Vísandi til at verkætlanin at byggja nýggjan skúla við Løgmannabreyt, hevur verið boðin út millum fimm arbeiðstakarar at geva tilboð uppá, hevur bygginevndin at verkætlanini, havt samskifti við allar tilboðsgevararnar. Víðari hava umboð fyri bygginevndina og tekniski stjórin havt fundir við lægsta tilboðsgevaran fyri at kanna tilboðið nærri. Eisini hava ivamál frá báðum pørtum verið umrødd, og útgreinaði. Vísandi til hjálagda notat, ið er niðurstøðan hjá umboðunum hjá TK, j. Nr. 2004-0214/ dagfest Tórshavn 23. febr. 2007, mælir bygginevndin býráðnum, umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina, til at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, longra byggitíðin uppá 30 mðr., áljóðandi kr. 98.271.956, uttan mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 7. mars 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 21. mars 2007:** Tekniski stjórin, býararkitekturin og bygginevndin kunnaðu mentamálanevndina um málið.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Bjørgfríð Ludvig, Jógvan Arge og Jan Christiansen mæla til at halda fast við síðstnevnda ískoyti, tó soleiðis at fyrivarni hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

Mikael H. Viderø, Ingibjørg Berg og Høgni Joensen mæla til at annulera lisitatiónina og bjóða arbeiðið út av nýggjum, har skúlin við Løgmannabreyt og Argja skúli verða boðin út saman í partalag.

**Mentamálanevndin 26. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, tó soleiðis at fyrivarni nr. 8 hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Útsett.

**Býráðið 28. mars 2007:**

43/07 **2007-0364**

**Uppskot til Reinsan av Hoydalsá 2. byggistig.**

**Lýsing av málinum-samandráttur:**
Umsitingin hevur saman við sp/f Martin E. Leo gjørt uppskot til burturveiting av spillivatni stig 2, íð fevnir um økið vestan- og sunnan fyri Hoydalsá. Arbeiðið er uppsett at kunna verða gjørt í fleiri stigum. **A** sum er oman fyri Svartafoss,- **B** undir Svartafossi. - **C** niðan fyri Skraddaragøtu. - **D** - Norðari Ringvegur (øki við húsini hjá Hilmar Kass). Hesi stig kunnu roknast sum sjálvstøðugar eindir, so tað er ikki neyðugt at gera allar undir einum.
Ætlanin er at fara undir kloakkarbeiði B – undir Svartafossi í ár, hetta er mett at kosta kr. 2.500.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað kr. 100.000,- til projektering at fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2007, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

Mælt verður harumframt til at flyta ætlaða íløgutørvin fyri kloakkarbeiði í 2007 og 2008 soleiðis at:

- Mál nr. 2007-0787 Reinskan av Vestaru Vág, stig 3: Pumpubrunnur Bøgøta-Vágsbotnur – mett til uml. 2,5 mió. kr.- verður flutt frá 2007 til 2008.
- Mál nr. 2007-0364 Kloakk við Hoydalsá, Stig 2, - eisini mett til uml. 2,5 mió. kr. - verður framflutt frá 2008 til 2007.

**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og mælir býráðnum um fíggjarnevndina til at játta kr. 100.000,- til projektering av íløgum til kloakkir fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mars 2007:**

44/07 **2007-0292**

**Uppskot til kloakk frá íbúðunum hjá Valbjørn Dalsgarð á Argjum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Nú Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari er farin undir at byggja 277 íbúðareindir á Hamrinum á Argjum, verður neyðugt at leggja eina nýggja høvðuskloakk til hetta øki. Ætlanin er at leggja hesa undir Hamrinum, út um bygdina og oman á sjógv.
Kloakkskipanin á Argjum er vánalig, so tað er ikki ráðiligt at veita meira í hesa, samstundis sum krav er um at allar veitingar skulu út í opnan sjógv.
Talan er um at byggja ein skúla heiman fyri barnagarðin á Hamrinum, og skuldi tá verið møguleiki at nýtt somu kloakk.

Biðið verður um at ráðgevi ger uppskot klárt til útbjóðingar, og at játtað verður kr. 155.000,00 til projekteringsútreiðslur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtað kr. 155.000.00 til projektering at fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2007, at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mars 2007:**

**45/07** **<u>2007-0648</u>**

**<u>Reinsan av vestaruvág</u>**

**<u>V.U. Hammersheimbsgøta – Gríms Kambansgøta, stig nr. 1, Rættará niðari partur.</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur.**
Umsitingin hevur saman við sp/f Martin E. Leo gjørt eitt uppskot til eina kloakkleiðing, sum víðariføring av verandi kloakk, sum er leidd út í Rættará oman fyri Ellisheimið. Ætlanin er at binda í hesa kloakk og leiða hana heim eftir V.U. Hammershaimbs gøtu og í Gríms Kambans gøtu .

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum.og játta kr.100.000,00 til projektering fíggjað av íløgum fyri kloakkir í 2007 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 8. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. mars 2007:**

**46/07** **2005-1661 (2005-1664)**

**Uppskot til reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað**

**Lýsing**
Undir fyrstu útstykking, síðani reglugerðin var broytt í 2005, vístu borgararnir ónøgd við hana.

Størsta ónøgdin var um raðhúsini, har keyparin hvørki kann hava ávirkan á innrætt-ingina ella kostnaðin.

Tilboðini til borgararnar er økt við íbúðum og randarhúsum, og vísti reglugerðin seg at vera eitt sindur óheppin í ávísum førum, og hetta hevur kommunan tikið til eftirtektar og gjørt uppskot til broytingar.

Galdandi reglugerð og umsitingarligu reglurnar vóru samtyktar á býráðsfundi 15. desember 2005.

**Fíggjarnevndin 1. februar 2007:** Uppskotið til broytan av reglugerðini var gjøgnum-gingið.

Samtykt at fáa advokathjálp og at taka málið uppaftur á einum seinri fundi.

**Ískoyti:**
Uppskot og viðmerkingar til nýggja reglugerð er send býráðslimum til ummælis við áheitan um at koma við møguligum viðmerkingum til viku 9.

Ongar viðmerkingar eru komnar.

Uppskotið er soljóðandi:

1. Reglurnar eru galdandi fyri umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað frá Tórshavnar kommunu.

   Somuleiðis eru reglurnar galdandi fyri útlutan av føstum ognum frá teimum, sum hava fingið lendi til vega frá Tórshavnar kommunu við tí treyt, at ognir, ið verða bygdar á lendið, verða útlutaðar sambært hesum reglum.

   Yvirlit yvir tílík byggjaríir kann fáast við at venda sær til Snarskivuna ella á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

2. Skilt verður millum niðanfyri standandi sløg av føstum ognum:
   a. Grundstykki.
   b. Sambygt hús, so sum tvíhús, raðhús og líknandi.
   c. Íbúð.

3. Bíðilisti verður gjørdur til hvørt slag av fastari ogn, ið er nevnd undir 2 a-c.

   Tórshavnar kommuna skilar sær rætt til at goyma fimm tey fremstu plássini á hvørjum bíðilista til umsøkjarar við bráðneyðugum serligum tørvi.

4. Við at lata inn eitt umsóknarblað standa tygum á bíðilista til øll sløg av føstum ognum, ið verða bjóðað út av kommununi.

   Um tygum ikki ynskja at standa á bíðilista til eitt ella fleiri sløg av føstu ognunum, nevnd undir 2 a-c, kunnu tygum velja hesi frá á umsóknarblaðnum.

   Um tygum seinni velja at søkja um eitt slag av teimum føstu ognunum, sum tygum upprunaliga hava valt frá, skulu tygum lata nýtt umsóknarblað inn hesum viðvíkjandi.

5. Tygum verða skrásett/ur á teimum ymisku bíðilistunum í raðfylgju eftir tí dagfesting, tá umsóknarblaðið er móttikið á býráðnum.

6. Tygum kunnu á umsóknarblaðnum velja at skráseta tygum fyri fleiri av teimum landafrøðiligu økjunum í kommununi, sum eru nevnd á umsóknarblaðnum.

7. Treytirnar fyri at verða sett/ur á og at standa á bíðilistunum eru hesar:
   a. Tygum skulu verða fylt/ur 18 ár.
   b. Tygum skulu verða skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu. Undantøk kunnu verða gjørd, um tygum einans fyribils eru flutt/ur ella flyta úr kommununi í útbúgvingarørindum ella arbeiðsørindum.
   c. Tygum skulu ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Tygum kunnu tó koma á bíðilista til grundstykki og/ella sambygt hús, um tygum einans eiga íbúð í kommununi.

d. Tygum skulu ikki áður hava fingið tillutað aðra fasta ogn til privatan bústað enn íbúð frá kommununa.
e. Eiga tygum íbúð ella hava tygum áður fingið tillutað íbúð frá kommununi, kunnu tygum ikki koma á bíðilista til íbúð.

8. Um tygum eru búsitandi uttanfyri Føroyar í útbúgvingarørindum, og tygum ikki vóru skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu, áðrenn tygum flutti úr Føroyum, kunnu tygum verða skrásett/ur á bíðilistunum hjá Tórshavnar kommunu tvey ár, áðrenn tygum verða skrásettur sum búgvandi í kommununi.

   Eru tygum ikki skrásettur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi tvey ár eftir, at umsókn tygara varð móttikin hjá kommununi, verða tygum strikað/ur av bíðilistunum uttan nærri fráboðan.

9. Treytirnar fyri at fáa tillutað fasta ogn eru, umframt treytirnar í 7 a-e, hesar:
   a. Tygum skulu verða skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu.
   b. Hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Tygum kunnu tó fáa tillutað grundstykki ella sambygt hús, um hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara einans eigur íbúð í kommununi.
   c. Hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara skal ikki áður hava fingið tillutað aðra fasta ogn til privatan bústað enn íbúð frá kommununi.
   d. Eigur hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara íbúð ella hevur hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara áður fingið tillutað íbúð frá kommununi, kunnu tygum ikki fáa tillutað íbúð.
   e. Tað skulu í minsta lagi ganga fimm ár ímillum, at tygum og/ella møguligur hjúnafelagi/sambúgvandi maki fáa tillutað fasta ogn frá kommununi.

10. Um tygum eru fylt/ur 50 ár, kunnu tygum, hóast tygum ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara eiga grundstykki og/ella sambygt hús í kommununi, verða skrivað/ur á bíðilista og fáa tillutað eina íbúð frá kommununi. Hetta er ikki galdandi, um tygum ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara frammanundan eiga íbúð í kommununi, ella áður hava fingið tillutað íbúð frá kommununi.

11. Tá fastar ognir verða útlutaðar í sambandi við nýggja útstykking, verður lutakast um, hvør av teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ynskja tað slagið av fastari ogn, ið verður útlutað, skal hava hvørja ogn. Lutakastið er alment.

    Møguleiki kann verða fyri umbýti av fastognini, sum tygum fáa tillutað, um onnur fastogn er tøk.

    Føstu ognirnar, sum eingin keypari er til, verða bjóðaðar teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ikki áður hava fingið bjóðað fasta ogn í tí útstykkingini. Tygum fáa sostatt ikki fleiri tilboð í somu útstykking.

12. Um tygum ikki taka av tilboði um fasta ogn, tá tygum fáa hetta í boði, verða tygum standandi á sama stað á bíðilistanum. Tygum kunnu tó í mesta lagi standa á bíðilistunum til fasta ogn í 15 ár frá tí, at umsóknarblaðið bleiv móttikið hjá kommununi.

    Eingin umsøkjari kann tó verða koyrdur av nøkrum av bíðilistunum, fyrr enn viðkomandi hevur fingið í boði fasta ogn til privatan bústað frá Tórshavnar kommunu minst tvær ferð.

13. Um tygum taka av tilboðnum um fasta ogn, verða tygum strikað/ur av øllum bíðilistum.

    Um tann fasta ognin, sum tygum fáa tillutað, er ein íbúð, kunnu tygum, um tygum ynskja tað, verða standandi á bíðilistunum til hini sløgini av føstum ognum.

    Um tygum eru yvir 50 ár og fáa tillutað eitt grundstykki ella eitt sambygt hús, kunnu tygum, um tygum ynskja tað, verða standandi á listanum til íbúð.

14. Tórshavnar kommuna kann í ávísum førum víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð, um serlig viðurskifti greitt tala fyri hesum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja nýggju reglugerðina.

Marin Katrina Frýdal tilskilar sær rætt til at koma við broytingaruppskotum til punkt 7c, 9b og 9c á býráðsfundi.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 28. mars 2007:**

**47/07** **<u>2000-3032</u>**

**<u>Søla av Randarhúsum í Hoyvíkshaganum Suður, t.e. grundstykki, betongarbeiði og projekt, og at kommunan ognar sær sokklarnar nr. 21 og 22 til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingarvegin</u>.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á tann møguleika, at samtakið fær arbeiðið at gera jørð, kloakk og betongarbeiði klárt til at byggja húsini, og at lonirnar síðani verða latnar byggimeistaranum at byggja og selja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. juni 2003:** Samtykt at kommunan letur gera útbjóðingartilfar av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á, og at biðja samtakið, sum ger útstykkingararbeiðið, um tilboð at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt at heita á fíggjarnevndina um at leggja pening út til projekteringsarbeiðið.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2003:** Samtykt at leggja upp til kr. 500.000,00 út fyri projektering.

**Ískoyti:**
Avtala er gjørd við arkitektar 99 um projektering av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á.

Neyðugt er at gjøgnumganga og projektera eina heila lon fyri at kenna neyðugu fortreytirnar fyri projektering av fundamentsarbeiðnum.

Síðani kann projektið seljast við lonini, tá ið henda verður seld.

Avtalaði kostnaðurin fyri projektering av einari heilari lon og jørð, kloakk og fundamentsarbeiði fyri restina av lonunum er kr. 654.830,00 + mvg, ella kr. 695.757,00 við 6,25% mvg.

Fyri at gjøgnumføra hetta er neyðugt við eini eykajáttan uppá uml. kr. 200.000,00.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2004:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Vísandi til at talan er um eina serliga verkætlan, har ein fyritreyt fyri, at ætlanin skal verða væl eydnað, er, at byggingin verður gjørd sambært ætlaða projektinum, og at neyðugt er at projektera eina lon fyri at gera betongarbeiðið liðugt, samtykti nevndin at heita á fíggjarnevndina um at leggja út kr. 200.000,00 afturat til projektering av einari lon, sum umfatar øll húsasniðini.

**Fíggjarnevndin 11. mars 2004:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, treytað av at kommunan eigur projektið og kann nýta hetta til hinar lonirnar uttan meirkostnað.

**Ískoyti:**
Nú er projekteringin av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini liðug, og eitt samtaki hevur biðið um at sleppa at geva eitt tilboð upp á arbeiðið sambært samtykt hjá byggi- og býarskipanarnevndini 2. juni 2003.

Tilboðið var lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. september 2004:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodna útbjóðing til Byggitek, Articon, Guttesen & Staksberg, J&K Petersen og MT Højgaard.

**Ískoyti:**
Lisitatión var mánadagin 27. september 2004, og komu 4 tilboð inn, MT Højgaard bjóðaðu ikki.

Ráðgevararnir, Arkitektarinir 99, hava gjøgnumgingið øll tilboðini og mæla til at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevði lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við ráðgevarunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevur lægsta boð, og at fíggjarlig uppseting fyriliggur til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at leggja út upp til tkr. 7.000 afturat fyri bygging, ráðgeving, eftirlit og meirvirðisgjald.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera jørð, kloakk og sokklar til randarhúsini í Hoyvíkshaganum Suður er væntandi liðugt ultimo januar 2006.

Kommunan hevur í hesum sambandi latið gjørt eitt fullfíggjað projekt uppá eina av átta lonum.

Lon 5, sum er liðugtprojekterað, umboðar øll húsasniðini, sum kommunan hevur góðkent í økinum, og eru sokklarnir háttaðir so, at húsasniðini frá Lon 5 verða sett ymiskt saman á hvørja lon sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða allar sokklarnar til randarhúsini samlað til sølu millum áhugaðar entreprenørar/byggisamtøk til kostprís til tann keypara, ið hevur lægsta søluprís at selja víðari.

Neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at teir, ið bjóða, eru førir fyri at fullføra projektið, tí eigur fyrivarni eisini at verða tikið um ikki at taka av nøkrum boði.

Eisini verður mælt til at áseta m.a. hesar sølutreytir:

Keyparin skal binda seg til:

at halda seg til byggisnið sambært projektinum fyri allar lonirnir, tó kunnu smærri tillagingar loyvast í samráð við kommununa,
at gera samlaðu bygginga lidna innan 3 ár,
at tann, sum keypir randarhús, skal vera á bíðilista hjá Tórshavnar kommunu, og
at kommunan kann seta treytir í sambandi við hesa víðarisølu.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunu-stjóranum og býararkitektinum og at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja til hægstbjóðandi og loyva víðarisølu til marknaðarprís.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Sjúrði Olsen um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jacobsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við samtyktini hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 26. oktober 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja sokklarnar fyri kostprís hvør sær ella saman til smærri entreprenørar í býnum og síðani at selja húsini aftur í fríari sølu.

**Býráðið 24. november 2005:** Fyrst var atkvøtt um tilmælið hjá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, sum fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen og Halla Samuelsen.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, sum var samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Orsakað av veðri og øðrum óvantaðum trupulleikum, er arbeiðið at stoypa sokklarnar nakað seinkað, men er nú um at verða liðugt. So er klárt at bjóða økið út til sølu.

Í grein 4 í ásetingunum fyri A3 øki stendur.:

> *Hús mugu einans verða bygd <u>í einari hædd við nýttum lofti</u> og mugu ikki vera hægri enn <u>5 m til yvirgrind</u> og 9 m til mønuna mált frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini). Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendi, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 er tó loyvt at leggja kjallaraloftið upp til 2,5 m oman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.*
>
> *<u>Í heildarætlan ella í serætlan fyri náttúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.</u>*

Samanbygdu húsini eru sambært projektinum í 2 og 3 fullum hæddum og meira enn 5 m til yvirgrind. Tí er neyðugt at býráðið samtykkir projektið sum ein serætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, sum grein 4 heimilar. Hetta fyri at byggjast kann sambært projektinum.

Í sambandi við útbjóðingina er eisini neyðugt at frámatrikulera lendið, har samanbygdu húsini skulu standa, frá felagsøkinum.

Umsitingin metir tað verða rættast, at hvørt av samanbygdu húsunum eigur stykkið, har húsini standa á. Harafturat skal hvørt hús eiga 2 ávís parkeringspláss og ein skúr sambært hjáløgdu støðumynd.

Hendan loysnin er umrødd við Matrikulstovuna, sum tekur undir við henni. Matrikulstovan mælir eisini til, at øll samanbygdu húsini verða sundurbýtt, áðrenn bygt verður.

Í sambandi við verkætlanina "Stóratjørn" hava ynski verið um, at hava eina beinleiðis farleið, ið bindur Karlamagnusarbreyt og Stórutjørn saman. Hetta kann merkja, at tvey tey eystastu húsini í lon 5, skulu takast burturúr ætlanini um samanbygdu húsini í Hoyvíkshaganum suður.

Av tí at Karlamagnusarbreyt gongur ígjøgnum eina útstykking, kann ein koyrivegur, við gjøgnumkoyrandi ferðslu, ikki gerast her, hetta vil broyta fortreytirnar fyri fólki, sum hevur keypt grundøki í Hoyvíkshaganum suður. Tí kann talan bert verða um eina gonguleið ígjøgnum økið.

Um nevndin samtykkir hesa farleiðina, er neyðugt at lýsa ein servitutt á økið, um at hetta er ein gonguleið og ikki ein koyrivegur, har bert eigarafelagið hevur átalurætt. Eisini má kommunan bera kostnaðin av tí arbeiði, sum er gjørt á økinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir byggiætlanina við samanbygdum húsunum í útstykkingini Hoyvíkshagi suður, sum ein serætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki sambært projektinum fyri byggingina.

Eisini mælir býararkitekturin til, at samanbygdu húsini verða sundurbýtt sambært hjálagda kortskjali, soleiðis at hvørt hús eigur 2 ávís parkeringspláss og ein skúr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Síðani samtykti nevndin at heita á býráðið, at kommunan ognar sær sokklarnar nr 21 og 22 v.m. til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingarvegin.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini at fíggja av útstykkingarætlanini fyri Hoyvíkshagan norðan fyri sambindingarvegin.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at lata tilboð inn um keyp av økinum til samanbygd hús var 6. juni 2006.

Inn komu 2 tilboð.

Eitt frá sp/f S. H. Smíð, v/ Hanusi Olsen, á kr. 82,490 mill. og eitt frá samtakinum J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil á kr. 82,635 mill.

Viðmerkjast skal, at í báðum tilboðum eru nøkur ivamál, eins og onkrar upplýsingar vanta. Skal farast víðari við málinum má hetta kannast fyrst.

Tilboðini lógu rættiliga tætt. Munurin var bert kr. 145.000,00 av einum samlaðum víðarisølukostnaði uppá uml. kr. 82,5 mill.

Ein samlaður víðarisølukostnaður uppá kr. 82,5 mill gevur ein $m^2$ prís uppá kr. uml. 15.000,00. Hetta gevur ein miðal kostnað uppá uml. kr. 2 mill fyri 132 $m^2$ og kr. 1,33

mill fyri 88,5 $m^2$, tó skal man rokna við, at tey smærru húsini kosta lutfalsliga meira enn tey størru.

Kommunan hevur latið ein óheftan ráðgeva gera eina útgreinaða kostnaðarætlan fyri byggingina. Hendan vísir, at tilboðini eru rímilig.

Prísurin, teir privatu byggiharranir, ið byggja íbúðir í TK, vanliga rokna við, er kr. 16.000,00 pr. $m^2$ fyri íbúðir.

Í útboðsskrivinum verður dentur lagdur á, at kommunan ynskir at útvega borgarunum dygdargóðar og bíligar bústaðir.

Í hesum projektinum við samanbygdum húsum í Hoyvíkshaganum suður, er dentur sostatt lagdur á góðsku. Tilfarið, sum húsini eru bygd av, hevur eina høga góðsku, og nógv er eisini arbeitt við útsjóndini á húsunum.

Húsini verða harumframt leverað heilt liðug við dygdagóðum gólvum, køki og hvítvørum og liðugt málað. Uttanfyri hevur hvørt hús ein skúr, 2 parkeringsøki, terassu og partvís liðugt øki til urtagarð.

Sæð út frá hesum, metir býararkitekturin/byggideildin, at kostnaðurin er tann rætti, og at keyparin fær ein kvalitetsbústað fyri kostnaðin.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin í fyrstu syftu fær heimild at seta seg í samband við tilboðsgevararnar fyri at nágreina innkomnu tilboðini og harvið gera tey meira sambærilig.

Tá hesi viðurskifti eru kannað, vendir umsitingin aftur við endaligum tilmæli.

**Fíggjarnevndin 29. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Upphæddirnar í innkomnu tilboðunum vóru sum kunnugt upprunaliga hesar:

Samtakið J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil:
**Kr. 82.635.125,00**

Sp/f S.H. Smíð:
**Kr. 82.490.000,00**

Síðani fíggjarnevndarfundin 29. juni 2006 hevur umsitingin verið í samband við tilboðsgevararnar fyri at nágreina innkomnu tilboðini og gera tey meira sambærilig. Tilboðsgevararnir hava fingið skriv, har teir eru bidnir um at greiða frá ávísum ógreid-

leikum við tí, ið fevnt var av tilboðnum og tiknum fyrivarnum. Eisini hevur fundur verið við báðar tilboðsgevararnar.

Eftir hetta samskifti hava báðir tilboðsgevararnir skrivliga boðað kommununi frá, hvørjar broytingar í upprunaligu tilboðsupphædd teirra hesar nágreiningar hava elvt til.

Samtakið J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil hevur soleiðis upplýst, at eftir at fyrivarni eru strikað og útgreinað er, hvat er fevnt av uttandura arbeiði/jørð-arbeiði teirra, er tilboðsupphæddin óbroytt, t.e. at samtakið bjóðar seg framhaldandi til at gera arbeiðið fyri **kr. 82.635.125,00.**

Sp/f S.H. Smíð hevði í tilboði sínum og í seinni skrivi ikki tikið uttandura arbeiði/jørðarbeiði við, eins og uttandura máling ikki var íroknað. Síðani fundin við umsitingina hevur sp/f S.H. Smíð tí boðað frá, at aftrat tilboðnum frá felagnum skulu leggjast hesar upphæddir:

Málaraarbeiði uttandura:

| | |
|---|---|
| Húsatypa 1 | Kr. 26.850,- |
| Húsatypa 2 | Kr. 34.850,- |
| Húsatypa 3 | Kr. 34.850,- |
| Húsatypa 4 | Kr. 34.850,- |

Jørðarbeiði aftanfyri húsini:

| | |
|---|---|
| Planering við skervi | Kr. 296.250,- |
| Slætta verandi mold | Kr. 495.000,- |

Samanlagt hevur útgreiningin av tilboðsprísinum frá sp/f S.H. Smíð við sær, at samlaða tilboðsupphæddin hækkar við 2.299.300,00 og fer úr kr. 82.490.000,00 til **kr. 84.793.500,00 -** (talið 84.793.500 er funnið soleiðis: 82.490.000 + 495.000 +296.250 + 187.950 (t.e. 7*26.850) + 1.324.300 (t.e. 38* 34.850) = 84.789.300).

Endaligu tilboðini síggja sostatt soleiðis út:

Samtakið J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil:
**Kr. 82.635.125,00.**

Sp/f S.H. Smíð:
**Kr. 84.793.500,00.**

Umsitingin hevur onga orsøk til at finnast at fakliga og fíggjarliga førleikan hjá hvørgum av tilboðsgevarunum at fullføra verkætlanina.

**Tilmæli:**
Havandi í huga endamálið við hesi ætlan, nevniliga at útvega borgarunum dygdargóðar og bíligar bústaðir, mæla kommunustjórin og býarарkitekturin til, at býráðið umvegis

fíggjarnevndina tekur av lægra tilboðnum, ið er frá Samtakinum J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil. Samstundis fær umsitingin heimild at fara undir samráðingar við samtakið um skeytistreytir, sáttmálatreytir, víðarisølutreytir o.l. og annars at avgreiða søluna.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum og at selja ognina, matr.nr. 135fe, Hoyvík, fyri kr. 18.000.000.

**Býráðið 21. september 2006:** Skriv frá sp.f. S. H. Smíð, dagfest 18. september 2006, viðvíkjandi tilboði uppá randarhús í Hoyvíkshaganum Suður, og skriv til borgarstjóran, dagfest 21. september 2006, frá kommunustjóranum vóru framløgd. Hesu skriv vóru eisini framløgd á fíggjarnevndarfundi 21. september 2006.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 13. september 2006.

**Ískoyti:**
Í sambandi við samráðingarnar við Samtakið J&K Petersen og Sandavágs Timburhandil um tilboðið kr. 82.635.125,- var neyðugt at gera reguleringar í tilboðsupphæddini orsakað av, at tilboðið er grundað á 45 sokklar, meðan býráðið á fundi 27. apríl 2006 samtykti, at kommunan skuldi ogna sær sokklarnar nr 21 og 22 v.m. til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingarvegin. Upprunaliga kom ynski um at útvega samband frá Heiðunum yvir til økið við Stórutjørn, frá stigtakarunum til Stórutjørn, og var tá talan um burturtøku av 2 sokklum. Býararkitekturin og plandeildin metti hetta sum eitt virðismikið íkast fyri hetta bústaðarøkið og kundi taka undir við hesum uppskoti.

Tá greiða var fingin á hvat prísurin fyri at regulera tilboðsupphæddina við at taka burtur tveir sokklar var greitt, at tilboðsupphæddin hjá Samtakið J&K Petersen og Sandavágs Timburhandil lækkaði lutfalsliga lítið, og komst hetta av, at m.a. byggileiðsla, rakstur av byggiplássinum o.a. var óbroytt uttan mun til um talan var um 45 ella 43 sokklar. Harafturat kom kostnaðurin fyri at taka burtur teir báðar sokklarnar, sum gjørdir eru. Hetta merkti so, at miðalkostnaðurin fyri øll hini húsini kom at hækka við tí upphædd, sum felagsútreiðlsurnar fyri hesar báðar sokklarnar fevndu um.

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri bæði kommununa og allar hinar húsaeigararnar gjørdi, at kommunustjórin saman við teknisku umsitingini metti um, hvørt tað var avgerandi fyri prosjektið viðv. samanbygdu húsunum á Heiðunum og sambandinum yvir til Stórutjørn, at tiknir blivu 1 ella 2 sokklar burtur. Við at taka ein sokkul burtur, fekst ein uml. 11 m breiður geiri millum húsini, meðan tað við at taka báðar sokklarnar burtur, fekst ein uml. 16,5 m breiður geiri ímillum. Við bert at taka tann eina sokkulin burturúr, minkaði samlaða sáttmálaupphæddin við kr. 1.158.810,- til kr. 81.476.315,-, meðan sáttmálaupphæddin við at taka 2 hús burturúr minkaði við kr. 2.375.000,00 til kr. 80.260.125,00. Harumframt skuldi kommunan so rinda fyri burturtøkuna av sokklunum. Her skal skoytast uppí, at søluprísurin fyri endahúsið (typa 3A) er settur til

kr.1.965.000,- og til seinna húsið (typa 2C) til kr. kr.1.911.101,-. Á hesum grundarlagi metti umsitingin, at neyðugt var at meta um, hvørt tað var vert ein prísmun á kr. 1.216.190,00, at fáa omanfyrinevnda geira millum húsini uml. 5,5 m breiðari, við at taka báðar sokklarnar burtur. Tekniski stjórin metir, at hesin geirin kann virka fullvæl við eini breidd á 11 m, og at tað kann verða ein ov høgur prísur at rinda fyri at gera geiran 16,5 m breiðan.

Tekniski stjórin mælir til, at halda fast um ætlanina at gera ein geira ímillum, men at stigtakarin til Stórutjørn verður spurdur um at rinda munin á kr. 1.216.190,00 fyri at gera geiran 16,5 m breiðan, og at spurningurin um luttøku í fíggingini av gongubrúnni tvørtur um sambindingarvegin eisini verður tikin upp til viðgerðar tá skeyti um sølu av lendi til Stórutjørn verður skrivað.

Tekniski stjórin kann á hesum grundarlagi viðmæla at heita á býráðið um at broyta avgerðina frá 27. apríl 2006, soleiðis at bert ein sokkul verður tikin burtur, um so er at stigtakararnir til Stórutjørn ikki vil luttaka í kostnaðinum fyri upprunaligu loysnina.

**Tekniska nevnd 22. mars 2007:** Nevndin samtykti heita á býráðið at broyta avgerðina frá 27. apríl 2006, soleiðis at bert ein sokkul (typa 3A í lon 5) verður tikin burtur og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2007:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd 22. mars 2007.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. mars 2007:**

**48/07** **<u>2005-1092</u>**

**<u>Byggilendi í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
**Kollfjarðarnevndin 19. apríl 2005:** Nevndin vísir á, at tørvur er á áleið 30 sethúsastykkjum í Kollafirði.

Semja er um at biðja býarverkfrøðingin/býararkitektin koma við hugskoti til, hvar útstykkjast kann til næsta fund.

**Kollfjarðarnevndin 23. mai 2005:** Kári Finsson møtti fyri byggideildina og vísti á ymiskar møguleikar fyri sethúsastykkjum.

Nevndin heitir á kommununa um at útvega áleið 50 sethúsastykki í Kollafirði.

**Ískoyti:**
Vísandi til at tað er eitt stórt arbeiði at gera eina útstykking við 50 grundøkjum og kann taka rættiliga drúgva tíð, áðrenn nøkur hús verða bygd eftir einari slíkari ætlan, metir umsitingin, at tað er rættast at fara í gongd við nakrar smærri ætlanir fyri at loysa bráðneyðuga tørvin, ímeðan arbeitt verður við eini størri útstykking.

Umsitingin hevur hugt eftir økjum, sum er ogn hjá antin Jarðarráðnum ella privatum, sum eru áhugað í eini møguligari útstykking.

Onnur øki eru eisini í Kollafirði, bæði smærri og størri, men hesir eigarar eru ikki spurdir um teirra ætlanir fyri øki teirra.

Við teimum økjum, sum umsitingin metir verða væl egnað til útstykking í fyrstu atløgu, verða tilsamans eini 22 nýggj grundstykki. Hesi grundstykk eru býtt í fýra smærri útstykkingar.

1. Útstykkingin nakað norðari og oman fyri Lygnnes (uml. 3 grundstykki) er ogn hjá kommununi og hevur bert smærri tillagingar av fríøkinum við sær.

2. Útstykkingin oman fyri Lygnnes (uml. 8 grundstykki) er treytað av, at eigararnir eru fyri eini útstykking. Kommunan hevur óformelt tosað við onkran av eigarunum og var ein positivur hugburður fyri eini møguligari útstykking. Eigararnir hava tó ikki enn sæð nakra endaliga útstykkingarætlan fyri økið, og skal hetta tí takast við stórum fyrivarni.

3. Útstykkingin undir Homrum (uml. 5 grundstykki) liggur í løtuni hjá Jarðarráðnum til viðgerðar.

4. Útstykkingin við Kjalnes (uml. 6 grundstykki) krevur eina broyting í byggisamtyktini.

Viðlagt eru 5 kortskjøl, sum vísa á omanfyri nevndu útstykkingar og teirra staðseting í bygdini.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlanum fyri framtíðar búsetingum í Kollafirði. Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir, at tekniska umsitingin fær tey fyrstu uml. 22 grundstykki, sum býarskipanardeildin hevur víst á, at arbeiða víðari við.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at kunna kollfjarðanevdnina um hetta arbeiði.

**Kollfjarðarnevndin 12. september 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Uppskot kemur frá teknisku umsitingini, um hvar ein størri útstykking kann fara fram, og við uppskoti til broyting av byggisamtyktini í sambandi við hetta.

**Kollfjarðarnevndin 21. november 2005:** Kollfjarðarnevndin tekur undir við omanfyristandandi og vísir á, at møguleikar eru eisini fyri útstykking norður í Sundum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 7. november 2005 samtykti at broyta byggisamtyktina fyri eitt grundøki á Kjalnesi (mál nr. 2002-1350, Jóan Jakku Joensen) metir umsitingin, at tað er rætt at broyta eitt størri øki, soleiðis at tað verður pláss fyri 6 grundøkjum her.

Hetta er ein av teimum smærri útstykkingjunum, sum byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 13. juni 2005 samtykti, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við. Í heildarætlanini fyri Kollafjørð er hetta lagt út sum A3-øki.

Arbeitt verður eisini víðari við eini størri útstykking í hesum økinum.

Eisini hevur umsitingin hugt eftir einum øki norðuri í Sundunum, har pláss er fyri uml. 12 grundøkjum. Hetta øki eru 2 traðir, sum Føroya Jarðargrunnur eigur.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært hjáløgdum kortskjali, og at arbeitt verður víðari við økinum norðuri í Sundunum sum er byggilendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Kollfjarðarnevndin 30. januar 2006:** Kollfjarðarnevndin mælir til at taka undir við uppskoti til útstykking norður í Sundum, sbrt. kortskjali, "útstykking norði í sundi, 30. januar 2006."

Kollfjarðarnevndin mælir eisini til, at farið verður víðari við útstykkingini móti Kjalnesi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Freistin at mótmæla broytingina av byggisamtyktini fyri Kollafjørð við Kjalnes er nú farin.

Kommunan hevur móttikið eitt mótmæli frá Eddie H Joensen, bóndi á Kjalnesi.

Hann mótmælir at kommunan tekur bøin bita fyri bita í staðin fyri at TK og bóndin koma ásamt um eina avtalu, sum báðir partar kunnu liva við.

Í hesum sambandi hevur leiðslan havt ein fund við Eddie H Joensen um møguligar framtíðar loysnir.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at halda fast við ætlaðu broytingina og arbeiðið við at finna eina framtíðar loysn við Eddie H Joensen heldur fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 8. juni 2006:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í skrivi, dagfest 18. januar 2007, boðar Eddie H. Joensen, bóndi frá, at hann ” Undir teirra fortreyt, at arbeitt verður víðari við málinum at skipa eina framtíðar loysn fyri hvussu ætlanir býráðsins um býarbygging og vinnumøguleikar mínir við garðinum kunnu leggjast í eina ítøkiliga ætlan, so at allir partar kunnu liva við tí, taki eg mótmæli mítt aftur”.

**Býráðið 28. mars 2007:**

49/07 **2004-1434**

**Fyrspurningur frá felag um møguleikarnar fyri at fremja eina ætlan um at byggja neyst í einum parti av grótbrotinum norðanfyri SEV-verkið á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá umsøkjara um at fáa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið) avlagt til p/f Sundsneystini til neystabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina um eina skipanarætlan fyri økið og lýsing av atkomumøguleikunum og at boða umsøkjaranum frá hesum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin hevur um telefonina havt samband við stovnararnar av p.f. Sundsneystunum og eftirlýst

1) umsókn um at keypa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið)
2) skipanarætlan fyri økið
3) lýsing av atkomumøguleikunum.

ad 1) Beinleiðis umsókn er ikki send kommununi, men teir vísa til teldubræv frá 30. juni 2005.
ad 2) skipanarætlan er ikki latin kommununi, men teir hava eina ávegis skipanarætlan at lata.
ad 3) Sum ad 2.

Kommunan hevur fyri tíð síðani keypt lendið (grótbrotið), matr. nr. 4c, Sunds bygd, fyri kr. 262.250,05, sbrt. skeyti frá 14. juli 2005 við treytum.

Búnaðarstovan upplýsir, at kommunan herumframt hevur rindað eitt sindur meira fyri lendið, síðani tað var keypt fyri tíð síðani.

Herumframt hevur kommunan rindað fyri tinglestur og matrikulering.

Í sambandi við málsviðgerðina verður víst til umfarskriv, dagfest 27. oktober 1961, frá Føroya landsstýri til Tórshavnar kommunu og øll kommunustýrini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til um fíggjarnevndina at leiga sp/f Sundsneyst, matr nr. 4c, Sunds bygd, stødd 30.853 ferm., í 40 ár við rætti til framleingjan og fyri vanligan prís sum óbyggibúgvið havnaøki treytað av loyvi landsstýrisins og treytað av, at bygt verður innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, í prinsippinum, at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr.nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 ferm., til neystabygging og tilhoyrandi virksemi í 50 ár við rætti til framleingjan.

Leigan verður samsvarandi leigu av 3 traðum, t.v.s. kr. 3.000 pr. ár. Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílik bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvi fæst frá landsstýrinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen hevur ynskt málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Steðgað verður við avgreiðsluni av málinum, meðan heilsu & umhvørvisdeildin arbeiðir við at kanna møguleikan fyri økjum til tyrving.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini 13. september 2006.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal metir ikki at málið er búgvið at fara fyri býráðið vísandi til, at samtyktin í byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. juli 2005, enn ikki er fylgd og mælir til at koyra málið aftur í umsitingina.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 28. mars 2007:**

**FUNDUR LOKIN KL.**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Inga Dahl | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |